


*Nr. 7* **31. mars 2013** *73. árg.*

# Styrk brøður tínar

*Tá ið tú einaferð er vendur um, tá styrk brøður tínar. Luk. 22,32*

At venda um er at játta trúgv sína á Jesus. Nógv hava aldri gjørt tað; kanska tora tey ikki at avnokta Gud, men Jesusi hava tey ikki brúk fyri. Tey siga, at tað hevði verið lættari at trúð, um ein ikki skuldi taka støðu til Jesus og krossdeyða hansara. Men her eru Jesu orð greið: "Ongin kemur til faðirin uttan við mær." At venda um er at játta trúnna á Jesus.

Men her stendur okkurt afturat. "Tá ið tú einaferð er vendur um…." segði Jesus við Pætur skíriskvøld. Hvat sipaði hann til? Hevði Pætur ikki fyri trimum árum síðani drigið bátin upp á land og var farin í fylgi við Jesusi? Hevði hann ikki játtað: "Tú ert Kristus?" Hevði hann ikki sagt: "Harri, hvønn skulu vit fara til? Tú hevur orð hins æviga lívs."

Mundi Jesus ikki halda, at Pætur bara hevði lært helmingin? Umvendingin er at játta trúgv sína á Jesus. Og tað hevði Pætur. Men umvendingin er eisini at avnokta seg sjálva. Og tað hevði Pætur ikki lært enn. Eitt nei til egnar hugsanir og uppskot, eitt nei til at velja sín egna veg. Eitt nei til alt tað í okkum, sum sigur eg – eg – eg.

Har var onki pláss til krossin í ætlanum hansara. Hann leit á, at tað ja, sum hann hevði sagt, fór at halda. Men har mistók hann seg.

Vit kunnu ikki byggja á nakað av okkara egna, heldur ikki okkara egnu lyftir. Bara Jesu ja til okkara heldur. Ikki fyrr enn vit hava ásannað tað, kunnu vit styrkja brøður okkara. Pætur mátti á knæ, áðrenn hann lærdi tað. Øll, sum á ein ella annan hátt hava upplivað, hvat ið umvending er, mugu fyrst ígjøgnum hetta. Tey vita, at bara í hansara ja til okkara er hvíla at finna. Bara í hansara ja finna vit frímóð. Bara við hansara ja kunnu vit styrkja brøður okkara.

*Tín trúfesti og náði,*
*o, faðir, væl veit skil*
*á tí, sum mær er bági,*
*og bati verða vil,*

# *Slapp av við óttan*

Danir hava eitt blað, sum svarar til okkara "Sunnudagsblaðið". Tað eitur "Et Ord meg på vejen". Tað kom út á fyrsta sinni ár 1900, og síðani er tað komið út hvørja viku. Tað verður ikki borið í hvørt hús; men fólk noyðast at tekna seg fyri tað. Vit fara at taka eitt stykki burtur úr blaðnum, sum kom 22. aug. 2010.

Gerandisdagurin hjá Kirsten Hansen úr Bramming var nógv ávirkaður av, at hon hevði mist mann sín, sum hon hevði verið gift við í mong ár.

"Eg var so bangin, av tí at maður mín ikki var har at geva mær tryggleika," sigur Kirsten, sum er 80 ár.

"Eg tordi næstan ikki at koma til hús um kvøldarnar, tá ið eg hevði verið á møti í missiónshúsinum ella hevði verið og vitjað onkran. Áðrenn eg fór til songar, hugdi eg allar staðir at tryggja mær, at eingin var har."

Hesin óttin plágaði Kirsten í seks ár, til hon eitt kvøldið kom at hugsa um, at tað eisini bar til at biðja Gud taka óttan burtur.

Um náttina vaknaði Kirsten, tí hon hoyrdi eina harða og skilliga rødd tosa í myrkrinum. Røddin segði:

"Ver ikki mótfallin. Tí eg eri Gud tín. Eg eri við tær." (Hetta er eitt lyfti, sum stendur hjá Jes. 41,10).

"Eg tendraði ljósið at vita, hvør ið tað var, men har var eingin," sigur Kirsten. Hon skundaði sær at skriva orðini niður, so at hon ikki skuldi gloyma tey.

"Stutt eftir, tá ið eg las í Bíbliuni, kom eg fram á hesi somu orðini, sum røddin hevði sagt við meg. Tað var Gud, sum hevði talað við meg."

Eftir hesa nátt fekk Kirsten anda frítt, og hon var púra rólig. "Eg varnaðist, at Gud hevði beint mín ótta burtur. Tað var ein stór uppliving at vera loyst frá óttanum. Tað var eins og ein byrði, sum varð lyft av mær," sigur hon.

Síðani tá hevur Kirsten ikki verið bangin. "Eg eri trygg, tí eg veit, at Gud er tætt hjá mær. Eg eri ongantíð einsamøll. Hetta hevur styrkt trúgv mína á, at Jesus er við allar dagar," greiðir Kirsten frá.

Gjøgnum hesa uppliving er Kirsten vorðin mint á fleiri ting. "Vit kunnu biðja til Jesus um alt, sum nervar okkum. Hann hevur makt at leggja upp í lív menniskjans, og hann kann hjálpa okkum av við óttan, um tað er hann, vit stríðast við," sigur Kirsten Hansen at enda.

*Effie Campbell* umsetti.

---

Tú hevur mest brúk fyri kærleika, tá ið tú minst hevur uppiborið hann.

*e.c.* ums.

# Seinastu orðini hjá Dwight Moody

Hann var ein heimskendur prædikumaður.

Fáar tímar áðrenn hann doyði, lá hann leingi og durvaði. Tá ið hann hugdi upp, var hann øgiliga glaður.

„Eg havi verið innan fyri portrini og sæð míni kæru, sum eru farin heim undan mær," og nevndi abbabørnini við navni. „Eg havi sæð Irenu."

"Hetta er mín krýningardagur," helt hann fram. "Hetta er dýrdin. Um hetta er deyðin so er hann vakur!" Og andlit hansara lýsti, meðan hann nevndi tey, sum hann sá.

Aftur segði hann: "Er hetta deyðin, so er onki at óttast, tað er onki ringt við honum."

Og eftir ein støðg helt hann fram: "Hetta er ikki deyðin, hetta er sælan… tað er ongin deyði… tit mugu ikki biðja meg koma aftur… himmalin opnar seg… rópar á meg!"

Hetta vóru seinastu orðini hjá Moody.

# Lív í yvirflóð

Jesus segði; "Halda tit boð míni, tá verða tit verandi í kærleika mínum, líka sum eg havi hildið boð faðirs míns og verði verandi í kærleika hansara." Jóh. 15,10. Ólýdni skapar rivur í felagsskapin við Gud. Tú kanst gleðast um ein kenslubornan lovsong í gudstænastuni sunnumorgun; men um tú loyvir tær sjálvum at liva eitt syndafult lív gjøgnum alla vikuna, fert tú ikki at hvíla í kærleika hansara.

Ein av størstu myndunum um lív í yvirflóð, er myndin av tí, sum njósnararnir funnu í Lovaða Landinum. Í Bíbliuni eru drúvur, sum kunnu gerast til vín, ein mynd um lív í yvirflóð. "Tá ið teir komu til Esjkoldalin, skóru teir haðan vínviðagrein við einum vínberjatyssi á, sum tveir mans máttu vera um at bera millum sín á stong; haðan tóku teir eisini granatepli og fikur." 4. Mós. 13,23.

Hugsa tær - tað máttu tveir mans til at bera ein klasa, eitt tyssi! Hevur tú nakrantíð hoyrt um slíka yvirflóð? Lat hesa myndina standa fyri eygum tínum, og minn teg sjálvan alla tíðina á, at henda yvirflóð hoyrir teimum til, sum lurta eftir og eru Guds orði lýðin!

"...et Ord til Dagen"
*Effie Campbell* umsetti.

# Hendur móður – og Guðs

Signaðar verði hendurnar á móður, tá ið tær taka um hendur barnsins og leggja tær saman í bøn! Signaður verði muður á móður, tá ið hon leggur bønarorðini á varrar barnsins og í hjarta barnsins – longu áðrenn varrarnar duga at siga orðini røtt, og hjartað er bugvið at taka ímóti teimum.

Ja, signað verði hon sjálv, tí hon fellur á knæ við song barnsins. Í tí løtu, hon hetta ger, er hon prestur fyri Guði.

Gjøgnum hana verða bønarorðini borin ætt eftir ætt. Hon leggur alsamt aftrat hinum heilaga eldinum. Hon ber kirkjuna inn í heimið, og um jarðarríki ljóðar himmalrøddin.

Mong gomul fólk biðja enn bønina, sum móður teirra lærdi tey. Hvørt kvøld, áðrenn tey sovna, lesa tey inniliga tey orðini, sum tey fyrstu ferð hoyrdu móðurrøddina bera fram:

*Bið, o, Jesus fyri mær,*
*bið meg heim í hús hjá tær,*
*har at liva væl í frið*
*hjá tí halga einglalið.*
*Lat meg altíð elska teg;*
*Gott tú biður fyri meg.*
*Hoyr meg, Guð, mín vinur ver*
*fyri Jesu frelsugerð. Amen.*

*t.* umsetti.

---



**SUNNUDAGSBLAÐIÐ**

***ynskir øllum einar gleðiligar páskir.!***

***Blaðstjórin.***



---

**SUNNUDAGSSKÚLIN**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 31. mars. | Tekstur: | Matt. 28,1-15; | bíbliuorð: | Matt. 28,6b |
| 7. apríl. | Tekstur: | Matt. 21,12-16; | bíbliuorð: | Matt. 21,13b |
| 14. apríl. | Tekstur: | Luk.10,38-42; | bíbliuorð: | Matt. 6,33 |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74